



Serstaka heitið sipar til eina bygd í Grønlandi, har listakvinnan og familja hennara búðu í 1998. Sum í mongum av hinum myndunum verður støði tikið í eini uppliving, sum listarliga verður hevjað upp um tað persónliga, tíð- og staðarbundna, við einum foreinklaðum, dekorativum myndamálið, ið sker burtur óneyðugar staklutir.

## Bókin

Bókin um Sigrun Gunnarsdóttir inniheldur umframt tekstin hjá Evu Furseth uml. 80 myndir og minnir í sniði og skipan um snotiligu bøkurnar, sum Listasavnið hevur givið út fyrr í ár um ávikavíst Beintu av Reyni og Inga Joensen. Í øllum hesum bókum er teksturin lutfalsliga stuttur, tó at hann fyllir eitt sindur á trimum málum. Upprunateksturin er á norskum, haðani høvundurin, Eva Furseth er ættað, og hann er síðan týddur til føroyskt og enskt, sum eitt sindur ørkymlandi fylgjast á blaðsíðunum.

## Niels Kruse

Sum heild er teksturin skilagóður og lættur at lesa. Furseth er sera loyal og vælmeinandi mótvegis sínum evni, sum hon allarhelst er komin at kenna væl gjøgnum meylasamband og sum hon eitt nú forsvarar í mun til tað átrúnaðarliga innihaldið í myndunum. Hesin trúskapur er vælskiljandi, men økir ikki um spenningin í tekstinum. Eva Furseth tekur annars støði í uppvøkstri málarans á Eiði og leggur í hesum sambandi serliga stóran dent á týdningin, sum abbi Sigrun Gunnarsdóttir; Niels Kruse, hevur havt fyri hennara val av yrkisleið. Sigrun hevur alla orsøk til at vera errin av abba sínum, sum hevur lagt framúrskarandi verk eftir seg, ið óivað hava havt sína ávirkan á ta ungu listakvinnuna. Men ikki er lætt at síggja Niels Kruse í teimum myndunum, sum Sigrun ger í dag. Tá kemur tú heldur í tankar um tær symbolistisku myndirnar hjá Mikines frá 30´unum. Hóast stórur munur eyðvitað er á huglagi og stíli, eru nýggju myndirnar á sama hátt sum hesar, monumentalar, einfaldaðar og mytiskar, eins og summar av teimum fyrihalda seg til deyða, sakn og tilveruligar treytir sum heild.

## Meira naiv enn naivistisk

Hóast talan ikki er um beinleiðis naivismu, skerst ikki burtur, at bæði myndamál og symbolbrúk hjá Sigrun Gunnarsdóttir eru



rættiliga naiv. Hetta snýr seg kanska ikki so nógv um útbúgving sum um sinnalagið hjá avvarðandi listafólki. Eva Furseth metir ikki, at myndir Sigrun Gunnarsdóttirs kunnu kallast naivistiskar, hon skrivar: "...Einfaldar tekningar eru gjørdar við myrkari útlinju móti stórum einlittum flatum. Hetta verður av mongum roknað sum naivistiskt, ein lýsing ið kann gerast trupul at brúka, tá ið hugsað verður um hennara hollu útbúgving og væl vandu evni at tekna. Myndaframburðurin lýsir meiri royndina at finna eitt einfalt og rámandi myndamál, ið stuðlar boðskapin í myndini..." (s.50). Samanberingin, sum Furseth ger millum nakrar av myndunum hjá Sigrun og ikonmálningar er áhugaverd. Í forvitnisligu myndini "Tann frumborni", sum jú snýr seg um jólahøgtíðina, eru fleiri parallellir til miðaldarmálarí í modernaðum líki, t.d. er lítla reivabarnið við suttuni koppað upp frá myndapunktinum á sama hátt sum tað varð gjørt í ikonum. Á henda hátt verður tað narrativa tikið framum realismuna til tess at leggja dent á tað frásøguliga innihaldið í myndini.

Bókin kostar 250 krónur og fæst til keyps í Listasavni Føroya og í bókabúðum kring landið. Framsýningin í Listasavni Føroya letur aftur 1.januar í 2008.